# HANSARA DIRVI BROYTTI HEIMIN

# USA

## EDWARD SNOWDEN




**Tá ið Edward Snowden í juni 2013 lutaði skjøl hjá amerikonsku fregnartænastuni við fjølmiðlafólk, avdúkaði hann ómetaliga víðfevnt hópeftirlit um allan heim. Hann er als eingin landssvíkjari, men ein hetja. Kortini noyðist hann at liva í útlegd og kann verða settur í fongsul í tíggjutals ár.**

Tað, sum Edward Snowden avdúkaði, tá ið hann lutaði fregnartænastuskjølini við umheimin, var, hvussu stjórnir støvsúgva okkara persónligu upplýsingar til sín. Upplýsingar, sum fevna um eitt nú telefonuppringingar og -staðsetingar, privatan teldupost og netslóðir. Alt uttan okkara samtykki.

Hann segði sítt einasta endamál vera ”at kunna almenningin um tað, sum er gjørt í hansara navni, og tað, sum er gjørt ímóti honum”.

Tað, sum hann gjørdi, birti í altjóða kjak, sum broytti lógir og vardi okkara privatlív. Fyri fyrstu ferð í 40 ár samtykti USA lógir fyri stjórnareftirlit. Og á altjóða stigi leggja stórar fyritøkur sum Apple og WhatsApp nú meira fyri til tess at verja okkara privatu upplýsingar.

Einki av hesum var hent uttan Edward Snowden. Tann fyrrverandi amerikanski løgmálaráðharrin ásannaði, at avdúkingarnar hjá Snowden ”tæntu almenninginum”. Sjálvt Obama forseti staðfesti, at kjakið um eftirlit ”fer at gera okkum sterkari”.

Edward Snowden átti ongantíð at verið ákærdur fyri lógarbrot, sum hanga saman við mannarættindaavdúkingum. Kortini kann hann verða settur í fongsul í tíggjutals ár, ákærdur fyri at selja loyniligar upplýsingar til fíggindar hjá USA. Av tí at hann onga trygd hevur fyri rættvísari rættargongd í heimlandinum, livir hann í eini limbokendari støðu í Russlandi. Støðan ber í sær, at eisini rætturin til frælsi, frælsið at flyta seg og frælsið at biðja um friðskjól koma í vanda.

**Bið Obama forseta náða Edward Snowden, sum bara varskógvaði til frama fyri áhugamálini hjá almenninginum, áðrenn hann fer frá í januar 2017.**

# ÁHEITANARBRØV

## Skriva Obama forseta eini boð:

**Byrja við: "Dear president ...,"**

- Sig, hvørt tú ert, og hví tað ørkymlar teg, at USA setur grundleggjandi mannarættindir hjá Edward Snowden í váða.
- Bið hann lova Edward Snowden forsetagrið (Presidential Pardon) sum einum varskógvara, sum varskógvaði fyri at verja okkara mannarættindir.

Dear President Obama,

I urge you to grant a presidential pardon to Edward Snowden as a whistle-blower who spoke out to defend our human rights.

When he shared US intelligence documents with journalists, Edward revealed how governments were scooping up our personal data, including phone calls, emails and much more. His actions sparked a global debate and movement to protect our privacy online. Yet he's forced to live in exile and faces decades in prison.

President Obama, you yourself have said that the debate he triggered on surveillance "will make us stronger." Edward Snowden is a human rights hero. Please treat him like one.

Sincerely,

## Send boðini higar:

President Obama
The White House
1600 Pennsylvania Avenue NW
Washington, DC 20500

USA

# SAMHUGABRØV

## Fortel Edward Snowden, at hann er ein mannarættindahetja..

Skriva eini boð ella tekna eina mynd fyri at vísa, at heimurin stendur við hansara lið.

**Send boðini higar:**

Edward Snowden, c/ o Individuals at Risk Team
Amnesty International, 1 Easton Street

London WC1X ODW, UK



## ÁHEITANARBRØV

**Endamálið** við einum áheitanarbrævi er at fáa móttakaran at fremja eina gerð, ið ger at rættindini hjá einum øðrum menniskja verða hildin. Ofta verða áheitanarbrøv send til myndugleikapersónar sum t.d. kongalig, forsetar, forsætisráðharrar ella borgmeistarar, tí hesir persónar hava skyldu til at taka sær av teimum brotum, sum henda.

**Orðaval -** í einum áheitanarbrævi hevur stóran týdning fyri um móttakarin tekur brævið í álvara. Tað er umráðandi at vera fólkaligur, óansæð hvat móttakarin hevur gjørt, ella kanska ikki hevur gjørt.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.** Brúka bara heitið á móttakaranum, t.d. Tygara kongaliga hátign, Frú forseti ella Hr. borgmeistari.

**Inngangur -** Stutt frágreiðing um endamálið við brævinum.

**Áheitan -** Kann eisini nevnast høvuðsteksturin í brævinum. Her verður greitt frá trupulleikanum og grundgevingunum fyri at móttakarin eigur at hjálpa við at loysa teir.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**

## SAMHUGABRØV

**Endamálið** við einum samhugabrævi er at geva móttakaranum eina vón og eina trúgv uppá at hansara ella hennara stríð fyri rættvísi fer at eydnast. Brævið vísir móttakaranum at hann ella hon ikki eru gloymd og ikki stríðast einsamøll, men at umheimurin gevur sær far um tey brot, ið ganga fyri seg og stríðist fyri at mannarættindini hjá móttakaranum verða hildin.

**Innihaldið -** Tað eru nógvir møguleikar fyri hvat tú kanst skriva í einum samhugabrævi, og hvussu tú kanst skriva tað. Tú kanst skriva stutt ella langt. Tekna eina mynd ella skriva eina yrking. Tað er púra upp til sendaran at royna at meta um, hvat hann heldur at móttakarin hevur brúk fyri at hoyra. Tann, ið fær eitt samhugabræv er ofta tann persónurin, sum er fyri brotum á mannarættindini.

Brævið kann eisini sendast til avvarandi hjá persóninum, sum er fyri brotum. Tað vil siga familju, vinir og líknandi. Í nøkrum førum er tað ikki gjørligt at senda samhugabrøv beinleiðis persónin, sum er fyri brotum, tí myndugleikarnir, ið standa fyri brotunum forða fyri tí.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.**

**Innihald -** Hygg at frágreiðingini omanfyri.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir ella Kærar heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**